# Hundurin, kettan og músin seld til Fraklands

BØKUR

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein upprunaføroysk barnabók kemur út á øðrum máli. Men nú letur til, at bókin Ein hundur, ein ketta og ein mús eisini kemur út í Fraklandi. Tað er Bárður Oskarsson, ið hevur skrivað og teknað søguna um teir tríggjar originalarnar: hundin, kettuna og músina, sum keða seg so illa. Alt var nógv stuttligari fyrr, men tá ið músin slær hundin á halan við hamara, verður lív aftur í. Bókin, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út í fjør, var við á stóru barnabókamessuni í Bologna í vár. Fleiri forleggjarar vístu bókini stóran ans, og í farnu viku skrivaðu Bárður Oskarsson og franska forlagið undir sáttmála um útgávu.

Ungi evnaríki teknarin og rithøvundurin Bárður Oskarsson hevur rættiliga fingið vind í seglini. Í februar í ár fekk hann gávugóðs frá Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Bárður hevur áður teknað til fleiri barnabøkur, seinast til bøkurnar um Guðruna, ið Guðrun Gaard hevur skrivað. Triðja bókin um Guðruna kemur út til jóla.

# Skanning av livandi seyði fyri kjøt og fiti

**Royndarstøðin hevur keypt ein skannara at skanna kjøtmongd á seyði við. Hetta er gjørt, so tað skal verða møguleiki fyri at fáa staðfest, hvussu munurin millum kjøt og fitina er á livandi seyði**

LANDBÚNAÐUR

- Vit hoyra daglig, at maturin, sum vit eta, er alt ov feitur. Hetta hevur havt við sær, at fólk ikki ynskja at keypa ov feit krov og tí ynskja sær eitt kjøtut krov. Prísurin á seyðakjøti er í dag uml. kr 60 fyri kg, og skiljandi er at fólk ynskja, at á krovinum er sum mest av kjøti.

Hetta verður gjørt við at skannað verður niður á ryggin á seyðinum, og tá sæst munurin millum fitina og kjøtið. Á tann hátt ber til at taka tey lombini burtur úr, sum hava mesta kjøtið, sigur Eyðstein Jensen á Royndarstøðini í Kollafirði.

Í Íslandi hava teir skannað seyðin í fleiri ár fyri at staðfesta, hvussu munurin millum kjøtið og fitina á seyðinum er. Á tann hátt ber til at syrgja fyri, at teir brundseyðir og tey sleppingarlomb, sum skulu setast við, eru tey, ið eisini hava ta størstu kjøtfylluna.

Úrslitini hava verið so góð, at norðmenn nú eru byrjaðir at keypa sáð til ísáðingar í Norra.

- Teir bóndir ella seyðaánarar, ið hava áhuga í at fáa brundseyðin ella sleppingarlombini skannað kunnu seta seg í samband við Eyðstein Jensen á telefon 510195

# Føroya størsti burgari



Rúni Djurhuus, ið eigur og rekur nýggju ítróttarkaféina, Cippo, við Føroya størsta burgara.

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í gjár var almenn móttøka í nýggju ítróttarkaféini, Cippo, sum millum annað fer at bjóða viðskiftafólkum sínum Føroya størsta burgara.

Tað er Rúni Djurhuus, ið eigur og rekur nýggju ítróttarkaféina í hølunum undir Rio Bravo í Tórsgøtu í Havn.

Umframt Rùna fer Ingolf Olsen at kokkast í nýggju kaféini. Rúni og Ingolf eru báðir útlærdir kokkar á Hotel Hafnia, og teir siga seg vóna, at hetta skuldi borga fyri eini ávísari góðsku.

Á matarlepanum í nýggju kaféini verður eitt nú ymisk sløg av sandwichs, Føroya størsti burgari við búffi, sum er gjørdur av 300 gram av feskum oksakjøti, og bolla, sum bakaríið hjá Frants Restorff hevur bakað.

Eftir móttøkuna í gjár lat nýggja kaféin alment upp, og opið verður hvønn dag frá klokkan hálvgum tólv um dagin til á midnátt.

**tn**

# 14% fleiri ferðafólk í september



Í september mánaði hava tilsamans 14.868 fólk ferðast um floghavnina. Hetta er 13,7% fleiri enn september í fjør, tá talið var 13.074. Framgongdin hevur verið á øllum farleiðunum

Samlaða ferðafólkatalið higartil í ár er 145.397 móti 132.599 sama tíðarskeið í fjør. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 9,7% higartil í ár. Í hesum tíðarskeiðnum hevur vøksturin eisini verið á øllum farleiðunum.

- Operatiónirnar, tvs. fráferðir og komur, í september í ár hava verið 474 móti 435 í september í fjør. Hetta svarar til 9,0% fleiri operatiónir enn sama tíðarskeið í fjør. Higartil í ár hava operatiónirnar verið 4.330 móti 3.836 í fjør, ella ein øking svarandi til 12,9%, sigur sigur Statens Luftfartsvæsen á heimasíðuni.

Samlaði startmassin, ið er samlaða vektin á flogførunum, er nærum tann sami higartil í ár: 57.832 tons móti 57.512 í fjør, ella ein øking uppá 0,6%.

Útgreinaði hagtøl finnast annars á heimasíðuni hjá Vága Floghavn www.slv.dk/vagar.

BILRØKT
v/Jákup á Borg

Góðir brúktir bilar til serprís...



Fiat Scudo 2.0 JTD
Fyrr: 114.000
Nú: 94.000,-

Bmw 320i
Fyrr: 289.000
Nú: 265.000,-

Bmw 318 TDS
Nú: 70.000,-

Toyota Avensis Sol 2.0i
Fyrr: 138.000
Nú 105.000,-

sí meira á:
BILRØKT.fo

BILRØKT · v/ Jákup á Borg · Spógvavegur 14 · FO-110 Tórshavn · tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo